# Páll Fangi kann missa føroya-meistaraheitið

Tað er nú vandi fyri, at Páll Fangi, sum hevur verið í serflokki í ár, kortini ikki verður Føroyameistari.

Páll Fangi hevur verið í serflokki í ár og higartil hava teir vunnið allar stevnurnar, sum hava verið.

Sostatt hava teir eisini fult stigatal og hava altso 42 stig, sum eru heili átta stig frammanfyri nummar tvey, sum er Tvørabáturin, ið hevur 34 stig.

Av tí sama hevur seksmannafarið úr Klaksvík longu ognað sær føroyameistaraheitið, hóast ólavsøkan er eftir, tí ongin kann fáa hann aftur, hóast hann onki stig fer á ólavsøku.

Men sum tað sæst í øðrum greinum her á síðunum, hevur hevur alt umborð á Páll Fanga ikki tolað dagsins ljós, hóast teir siga sjálvir, at teir ikki vistu av tí og tískil vóru í góðari trúgv.

Nú hevur tann eini rógvarin umborð á Páll Fanga, Svein Rógvi Nielsen, beinleiðis viðgingið fyri Sosialinum, at teir á tveimum stevnum hava framt broytingar umborð á bátinum, sum Róðrarsambandið sigur eru ólógligar.

Tí er tað greitt, at hetta er eitt mál, sum Róðrarsambandið fer at taka upp.

Tað váttar Jakku Guttesen, kappingarleiðari í Róðrarsambandinum, fyri Sosialinum.

Hann sigur, at Róðrarsambandið fer at hava fund seinni í vikuni og tá verður hetta málið eisini tikið upp til viðgerðar.

Tá fæst at avita um tað skal fáa avleiðingar fyri Páll Fanga og í so fall eisini, hvørjar avleiðingar tað skal fáa.

Men verður avleiðingin av hesum, at Páll Fangi verður kolldømdur í tveimum stevnum, sum teir sjálvir viðganga, at teir hava róð við báti, sum Róðrarsambandið sigur er ólógligur, kunnu teir missa 14 stig og so verður ómetaliga tórført at varðveita FM-heitið, tí so skal Tvørabáturin bara verða nummar fimm og fáa tvey stig fyri at verða vísur í at verða meistari.

# Kraftigari tøk umborð á Páll Fanga

Hugskotið til tær broytingarnar í kappróðrarbátum, sum kappingarleiðarin ávarar ímóti í aðrari grein her á síðuni, hava róðrarfólk kring landið fingið frá klaksvíkingunum umborð á Páll Fanga, sum annars hevur verið heilt í serflokki í alt ár og hevur vunnið allar stevnurnar.

Á jóansøku er ein mynd tikin av Páll Fanga, sum vísir, at ein listi er skrúvaður upp á bekkin, so at rógvarin frammanfyri kann stinga føturnar upp ímillum bekkin og listan fyri at fáa meiri kraft, tá ið teir taka bekktøk.

Rógvarar siga, at tað svarar til, at svarar til, at tveir mans liggja á gólvinum og gera búkvenjingar, men har annar sleppur at hava føturnar uppi undir eini ribbu og hin ikki.

- Tað er eyðsæð hvørjar búkvenjingar krafta meiri. Sama prinsippið ger seg galdandi, tá ið bekktøk verða tikin, og summir rógvarar fáa stungið føturnar upp ímillum bekkin og listan, og aðrir ongan slíkan fyrimun hava, siga hesir somu rógvarar.

Umrødda myndin av Páll Fanga á jóansøku er eisini komin upp í hendurnar á Róðrarsambandinum og tí kann Jakku Guttesen staðfesta í aðrari grein her á síðuni, at hetta er "brandhamrandi" ólógligt, sum hann púra avgjørdur tekur til.

# STÚRA FY LEIKA Á Ó

**ÓLÓGLIGIR KAPPRÓÐRARBÁTAR** Fleiri manningar kring alt landið eru nú í ferð við at broyta kappróðrarbátarnar fyri at fáa teir at ganga betri, men Róðrarsambandið ávarar, tí tað kann enda við at allir bátarnir verða kolldømdir

Áki Bertholdsen

Vil heilt illa til, er vandi fyri, at kappróðurin á Ólavsøku verður avlýstur.

Tað staðfestir Jakku Guttesen, kappingrleiðari í Róðrarsambandinum.

Orsøkin til tað er, at runt alt landið eru kappróðramanningar í ferð við at broyta bátarnar fyri at fáa teir at ganga betri.

Men Róðrarsambandið ger púra greitt, at hesar broytingar eru ólógligar.

- Teir bátar bátar, sum møta upp á Ólavsøku við ólógligum broytingum verða kolldømdir, so einfalt er tað, staðfestir hann púra avgjørdur.

Hann stúrir eisini fyri, at í ringasta føri kann tað enda við, at allur róðurin á ólavsøku verður kolldømdir, ella í besta føri skerdur í so stóran mun, at hann heilt verður oyðilagdur, skuldi tað hent, at kappróðrarbátar í stórum tali møta upp við ólógligum broytingum.

- So verða vit noyddir at kolldøma allar bátarnar og tað vildi verið stak óheppið.

Alternativið er so, at listarnir verða skrúvaðir av aftur, men eisini tað kann elva til ruðulleika og nógvar seinkingar og tað vildi somuleiðis verið stak óheppið.

## Dýr misskiljing

Uppundir Vestanstevnu fekk Róðrarsambandið eina fráboðan um at broytingar vórðu gjørdar umborð á seksmannafarinum, Páll Fanga ur Klaksvík.

Broytingin er, at ein listi er skrúvaður upp á bekkin fyri at rógvarin kann taka meiri á, tá ið teir taka bekktøk.

Jakku Guttesen segði tá við Portalin, at fráboðanin leyk ikki treytirnar til eina kæru, men at Róðrarsambandið kortini hevði kannað Páll Fanga.

- Men har var onki at finnast at, segði hann við Portalin beint áðrenn róðurin á Vestanstevnu skuldi byrja.

Hinvegin hevur hann síðani fingið ábendingar um, at hetta hevur givið róðrarfólki kring alt landið ta fatan, at Róðrarsambandið hevur sostatt góðtikið hesar broytingar umborð á Páll Fanga.

- Av tí sama hava vit frætt um, at róðrarfólk kring alt landið eru farin at skrúva listar upp á bekkirnar við fyrimynd í myndunum, sum eru tiknar av Páll Fanga á Jóansøku.

Men Jakku Guttesen staðfestir, at hetta er ein stór misskiljing, tí tá ið Róðrarsambandið kannaði Páll Fanga á Vestanstevnu, var ongin listi av hesum slagi í bátinum.

- Sosatt hava vit ikki góðkent Páll Fanga við umrøddu listunum, sigur kappingarleiðarin.

Hann leggur dent á, at tað er so heilt avgjørt ikki lógligt at smíða, skrúva ella festa nakað sum helst á bekkirnar í einum kappróðrarbáti.

- Talan skal vera um ein beran bekk ímillum fimm og sjey tummar breiður og tað er sostatt ikki loyvt at seta ein lista á bekkirnar, sum hjálpir rógvarunum at draga seg upp, tá ið teir taka bekktøk, sigur Jakku Guttesen.

aki@sosialurin.fo

